

Harley við løgmanssteypinum í 1999



Harley við FM-steypinum í 1999




Harley á Molde Stadion í Noregi

málúrtøku uppá 144-0. Finalurnar ímóti LÍF vunnu teir samanlagt við 18-0. Harley plagar ikki at taka ógvusliga til orðanna, men hann er ivaleysur í, at tað er eitt met, sum ikki verður tikið. Umframt John William og Kurt Mørkerø, so var m.a. Jákup Mikkelsen á liðnum tá. Tá var hann útispælari. Harley dámar betri skipanina í yngru deildunum í dag, at javnbjóðis mótstøðulið møtast. Ov stóru ójavni var millum liðini í yngru deildunum fyrr. Liðið hjá Harley var eisini sterkt í dreingjadeildini, men tá mistu teir eitt FM-heitið, orsaka av einum skriviborðsfeili. Tað vóru rættiliga nógvir av teimum í 1980-unum, men tað er eisini bøtt uppá hetta í føroyskum fótbólti. Nú fáa feløgini bótt fyri slíkar feilir. Tá komið var upp til unglingaárini, vóru fleiri dragnaðir frá liðnum, so árgangurin gjørdist ikki so sterkur í unglingadeildini. Tá Harley var 17 ár kom tann fyrsti graslíkisvøllurin í Føroyum. Ì 1988 varð graslíkið lagt á vøllin í Klaksvík, og meðan arbeiðið var í gongd, fóru Harley og liðfelagarnir til Fuglafjarðar, fyri at venja á tí nýggja graslíkisvøllinum í Fuglafirði.

## Á besta liðið í 1988

Harley fekk sína debut á fremsta liðnum hjá KÍ í 1988, og var hetta árið tá KÍ bjargaði sær tilveruna í 1. deild í tí allarseinasta seinasta dystinum í kappingarárinum, sum var ímóti NSÍ. NSÍ rakti yvirleggjaran stutt áðrenn leiklok, og stóð á gomlum nøglum hetta árið: - Vit komu skeivt frá byrjan, tí vøllurin ikki var liðugur í Klaksvík. Og nógv av venjingini, var bara renning á vegunum. Av tí, at vit komu so illa frá byrjan, so hingu vit í botninum alt kappingarárið. Men ungir og góðir spælarar komu inn í hópin komandi árið, og KÍ hevði nú ein vøll, har spælandi var næstan alt árið. Og longu í 1990 fór veruliga at bragda. Saman við liðfeløgunum vann Harley ein knúsandi 6-1 sigur á GÍ í finaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Sigurin hevði ovurhonds stóran týdning fyri KÍ og allar Norðoyggjar. Tí talan var um fyrsta heitið, sum KÌ vann í bestu mansdeildini í 18 ár, og var fagnaðurin stórur, tá teir komu í land við Ternuni, tá hon legði at í Klaksvík.

## Vunnu FM í 1991

Fagnaðurin gjørdist ikki minni í 1991, tá tað aftaná eina bíðitíð uppá 19 ár, eydnaðist KÍ at vinna FM-heitið aftur. Harley var tó ikki við KÍ frá kappingarbyrjan. Várið 1991 var Harley á einum kristnum málskúla í Bournemouth í Suður-Onglandi. Heimafturkomin seinast í mai, fór Harley at venja við KÍ-hópinum. Harley spældi við 2. deild fyrstu dystirnar, men stutt tíð gekk, so bleiv Harley partur av 1. deildarliðnum hjá KÍ. B36 var á odda í byrjanini av kappingini, men so meldaði KÍ seg uppí gullstríðið við at vinna 3-0 á B36 í Gundadali: - Eg minnist, at vit vunnu 7 dystir á rað. Talan var ikki um nakrar stórsigrar. Tað bleiv togað í land við 2-1 sigrum og 1-0 sigrum, men tað eydnaðist so at vinna, meðan B36 meir at kalla steðgaði upp. Tað kundu vit so gera okkum dælt av. Vit vunnu 3-0 á B36 her norðuri, og løgdu okkum á odda tá. So upprann síðsti leikdagurin í Sarpugerði í Norðragøtu. Júst sama leikvøllin, har KÍ misti meistaraheitið í 1983 úr hondum í einum 1-5 tapi ímóti GÍ, og júst í líknandi illveðri. KÍ tapti aftur, hesaferð 1-2. Allir leikarar og viðhaldsfólk kundu kortini stórfegnast, tí núverandi løgmaðurin, táverandi HB-málverjin, Kaj Leo Johannesen hevði nakrar fepurbjargingar í Gundadali, sum forðaðu B36 í at vinna og fara avstað við FM-heitinum. Harley viðgongur, at teir sendu Kaj Leo nógvar penar tankar tá. Lagnunnar speisemi vildi tað soleiðis, at 15 ár seinni, ein stormfullan heystardag á Mølini á Eiði spældi KÍ meistaraheitið í hendurnar á HB, við at vinna 1-0 á EB/Streymi. Soleiðis verður alt útjavnað við árunum. Um 1991-liðið sigur Harley: - Vit vóru ungir og svangir, og vit vildu vinna, og vit høvdu eitt sera gott samanhald á liðnum. Har vóru nógvir góðir spælarar, og vit fungeraðu eisini væl, sum eitt lið. Undirstrikar Harley. Todi Jónsson og Jákup Mikkelsen, sum vóru partur av liðnum gjørdust seinni danmarksmeistarar.

## Fekk leikbann

Men tað er ikki bara FM-heitið, sum Harley kann seta í samband




Harley og póllendingurin, Marek